# »Modernaðir teoretikarar« komnir út í bók

**Á vári 2004 skipaðu Føroya Fróðskaparfelag og Fróðskaparsetur Føroya fyri fyrilestrarøð við heitinum "Modernaðir teoretikarar". Í røðini vóru átta fyrilestrar, sum nú eru komnir út sum greinar í bókini *Modernaðir Teoretikarar***

Allar greinirnar viðgera ástøðingar og ástøði, sum høvdu stóra ávirkan í 20. øld og enn eru eins viðkomandi.

Fýra greinir, tær hjá Jonathan Schwartz, Hans Andrias Sølvará, Firouz Gaini og Turið Sigurðardóttur, halda seg í høvuðsheitum til at greiða frá ástøði hjá einum ávísum ástøðingi og seta hann í størri høpi. Jonathan Schwartz, lektari emeritus frá Antropologisk Institut, Keypmannahavnar universiteti, leggur fram meginhugsanina í tí 100 ára gamla undirstøðuritinum *Protestant Ethic and Capitalism* eftir Max Weber (1864-1920) og greiðir frá hvussu ymisk rák hava tulkað Weber. Hann tekur harumframt nøkur skaldslig dømi, m.a. *Glataðu spælimenninar*, sum svara til greiningina hjá Weber av kapitalisisku menningini. Hans Andrias greiðir gjølla frá teimum árinsmiklu greiningunum hjá Foucault (1929-1984) av valds- og vitanarsamansetingum, og hví tað sambært Foucault er skeivt at greina eitt vitanarøki uttan at seta tað í samband við tey ítøkiligu valdsviðurskiftini. Firouz viðger Gellner (1925-1995) sum tann mikla rationalistin, ið vendi sær harðliga móti allari relativismu og vardi vísindaliga universalismu. Ein av teimum, ið fingu harða móttøku frá Gellner, var Said (1935-2004). Í grein síni kunnar Turið um høvuðsverk Saids, *Orientalism*, eitt grundrit í eftirlandafrøði ella postkolonialismu. Said byggir á valds- og vitanargreiningarhátt Foucaults, tá ið hann kannar vesturlendsk vísindi um Eystrið og kemur til ta niðurstøðu, at tey eru ein heildardiskursur, knýttur saman við valdi og yvirræði.

Hinar fýra greinirnar, tær hjá Guðrun Gaard, Maluni Marnersdóttur, Bergi Rønne Moberg og Eriku Anne Hayfield, leggja dent á bæði kunna um ástøði og geva dømi um, hvussu tað verður nýtt, tá ið eitt ávíst evnið verður granskað. Guðrun kunnar um dialogástøðið hjá Martin Buber (1878-1965) og lesur og greinir síðan yrkingar eftir Regin Dahl út frá tí. Greinin hjá Guðrun er skrivað við støði í gransking hennara sum ph.d.-lesandi á Fróðskaparsetrinum tey seinastu árini. Malan greiðir frá ástøðinum hjá Gérhard Genette (f. 1930) og Juliu Kristeva um, at allir tekstir eru partur av einum tekstkorpusi og greinir síðan eina yrking eftir Carl Jóhan Jensen út frá tí. Malan hevur áður viðgjørt ástøði um millumtekstleika gjølla í doktararitgerðini *Hvør av øðrum*. Bergur umrøðir ta hermeneutisku listfrøðina hjá Ricoeur (1913-2005) út frá spurninginum um mýtu og modernaðan tilvísingartrupulleika og lýsir hesa listfrøðina í viðgerð av stuttsøguni "Grylen" eftir William Heinesen. Greinin hevur rót í ph.d.-ritgerðini hjá Bergi um William Heinesen. Erika Anne, ph.d.-lesandi í Edinburgh, kunnar um ymisk ástøði viðvíkjandi brúki, mentan og barnauppaling ið eru bakstøði hennara, tá ið hon síðan greiðir frá brúkaramentan hjá børnum í gjølligastu grein, sum higartil er skrivað um hetta evnið á føroyskum.

Aftast í bókini er navna- og evnisorðaskrá. Bókin hevur undirheitið Setursrit 2, og tað minnir á, at í 1991 kom Setursrit 1: *Hon fekk hug á deyðum manni* við 4 greinum. Tvær av teimum eru fyrilestrar frá 25 ára hátíðarhaldi Fróðskaparsetursins í 1990.

Turið Sigurðardóttir, lektari á Føroyamálsdeildini, hevur ritstjórnað *Modernaðir teoretikarar,* sum er ætlað studentum, næmingum í teimum hægru skúlunum og øðrum áhugaðum.







Sansir søkja fyriskipara

# Fá skil á mongu træðrirnar

Sansir søkja eftir einum væl skipaðum fyriskipara.

Uppgávan fevnir um at leggja arbeiði til rættis innanhýsis, at betra um arbeiðsgongdir og at tryggja, at arbeiðsorkan verður gagnnýtt so væl sum gjørligt í húsinum.

Samstundis skal fyriskiparin røkja samstarvið við okkara veitarar, fáa tilboð til vega og tryggja okkum, at arbeiðini eru í lagi og verða veitt rættstundis.

Á Sansum starvast í løtuni 18 fólk. Vit eru eini samskiftis- og tøknihús, ið leggja stóran dent á at kenna okkara samstarvsfelagar væl, so okkara kunning og marknaðarføring samsvarar við teirra samleika.

Tú verður ein lyklapersónur í fyritøkuni, sum er nógv vaksin eftir stuttari tíð. Tú heldur skil á teimum mongu træðrunum og syrgir fyri, at arbeiði verða gjørd skynsamt og úrslitagott.

Tú hevur eina hægri útbúgving ella royndir á økinum.

Tað snýr seg um logistikk og samskifti. Tú stýrir arbeiðsgongdunum og dugir væl at tosa við fólk við tí fyri eyga at tæna heildini, so eitt gott úrslit fæst burturúr.

Er tað ein fragd at fáa tingini at virka? Send so eina umsókn við viðkomandi skjølum til:

Sansir
Att: Høgni Rasmussen
Tinghúsvegur 47
Postboks 1099
FO-110 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi innan 1. august 2005. Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at skriva til Høgna á hognir@sansir.fo ella ringja 355 355.

SANSIR

Postboks 1099, FO 110 Tórshavn, tel 355 355, faks 355 350, www.sansir.fo, info@sansir.fo



# Montørur

Vit sóknast eftir montøri at byrja 15. august ella skjótast gjørligt.

**Vit bjóða:**
- eitt spennandi og fjølbroytt starv
- tryggar arbeiðsumstøður
- gott arbeiðsumhvørvi

**Vit vænta av tær:**
- at tú hevur royndir sum timburmaður, snikkari e.l.
- at tú ert ágrýtin
- at tú bæði kanst arbeiða sjálvstøðugt og hevur góð samstarvsevni
- at tú ert fyrikomandi og álítandi

**Løn:**
Løn verður sambært nærri avtalu.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Dánjal Paula Poulsen, tel. 21 27 89.

Føroya Gluggi pf.

FO-385 Vatnsoyrar • Telefon 33 21 77 • Fax 33 31 66
T-post: post@h-window.fo • Heimasíða: www.h-window.fo